VIÐMERKINGAR

Spurningur til Carl Jóhan Jensen, Hesuferð

Jógvan Mørkøre
samfelagsfrøðingur
(– og tann, ið vanliga samskipar í Fynd.)

Carl Jóhan Jensen hevur 1. februar eina grein í blaðnum, »Stutt skiftistíð má vera eitt krav«, har hann vegna Hesuferð umrøður spurningin, hvussu long skal skiftis- ella niðurlagingartíðin vera? Líknandi grein er at finna á heimasíðuni hjá Hesuferð, men í hesum føringum ikki við Carl Jóhan Jensen sum undirskrivara fyri felagsskapin.

Í greinini lítur hann aftur á og kemur til eina marghættliga niðurstøðu, hví ið áramálið fekk so stóran politiskan týdning í politiska kjakinum.

Loyvi mær at endurgeva brotið við tí søguliga bronglinum:

»Tá ið orðaskiftið tók seg upp um ta fyrru fullveldisætlanina hjá landsstýrinum, ta ætlanina, sum tók fyridømi eftir íslendsku loysnini frá 1918, kom eitt í mangar mátar ógrundað áramál fram og varð læst um kjakið sum gjørð um tunnustavir. Í Hvítubók segði ein av útrokningunum, at við fimtan ára skiftistíð bar til at niðurlaga blokkin uttan at henda tilgongd fekk avleiðingar fyri vælferðina ella fylgjur fyri samfelagsbúskapin sum heild. Illa undirbygdar meiningakanningar gjørdu síðani, at hetta áramálið – fimtan ár – fekk alt ov stóran politiskan týdning«. At meiningakanningar hava fingið týdning í politikki, ætli eg mær heldur ikki at trætast um. Tað vita vit, eisini vit, sum takast við hetta. »Vit« eru tey, sum m.a. eru gingin saman til tess at tryggja, at veljarakanningar verða gjørdar við skili. Talan er um samtakið Fynd, ið fevnir um lærarar við miðnámsskúlarnar og Fróðskaparsetrið. Tað er øllum greitt innan fyri Fynd, at tað fylgir ein stór ábyrgd við at gera veljarabundnir saman, síðani føroyingar takkaðu nei til tilboðið frá Alberti fyri skjótt einari øld síðani. So mikið um hatta í hesum umfari.

Tað, sum fellur mær fyri bróstið í greinini hjá Carl Jóhan Jensen, og fær meg at trýsta á knapparnar, er seinasti setningurin í tí endurgivna: »Illa undirbygdar meiningakanningar gjørdu síðani, at hetta áramálið – fimtan ár – fekk alt ov stóran politiskan týdning«. At meiningakanningar hava fingið týdning í politikki, ætli eg mær heldur ikki at trætast um. Tað vita vit, eisini vit, sum takast við hetta. »Vit« eru tey, sum m.a. eru gingin saman til tess at tryggja, at veljarakanningar verða gjørdar við skili. Talan er um samtakið Fynd, ið fevnir um lærarar við miðnámsskúlarnar og Fróðskaparsetrið. Tað er øllum greitt innan fyri Fynd, at tað fylgir ein stór ábyrgd við at gera veljarakanningar, sum verða brúktar í tí politiska orðaskiftinum og talvinum.



Hvussu tað arbeiðið hevur verið skipað hetta seinasta árið, spurningurin um longdina á skiftistíðini av álvara gjørdist eitt politiskt mál, er skjótt at greiða frá: Tá ið tað var greitt, at landsstýrið fór í samráðing seinasta vár, varð avtala gjørd við størstu føroysku fjølmiðlarnar, Dimmalætting, Sosialurin, Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya. Avtalan var í stuttum ein avtala um nær, hvør fjølmiðil skuldi fáa eina kanning. Uppleggið var, at fyrsta kanningin skuldi gerast, tá ið samráðingaruppleggið hjá landsstýrinum var kent; næsta, tá ið vit vistu, hvat ið danska stjórnin hevði at bjóða, og tær tvær seinastu, tá ið avtala møguliga var gjørd og upp undir fólkaatkvøðuna, sum skuldi góðkenna avtaluna. Tær tvær fyrstu kanningarnar vórðu gjørdar eftir hesum leisti, men av tí at tað ikki eydnaðist at fáa eina avtalu við donsku stjórnina, vórðu tær tvær seinastu kanningarnar gjørdar við støði í teimum fastlæstu støðunum hjá þørtunum. Spurningarnir hava tískil verið orðaðir, so veljarin kundi siga sína hugsan um ætlanina hjá landsstýrinum, fekk tað sítt ígjøgnum, og um ætlanina hjá mótpartinum, donsku stjórnini, fekk hon sítt ígjøgnum.

Tá so Carl Jóhan Jensen síðani fær tað til, at »illa undirbygdar meiningakanningar gjørdu síðani, at hetta áramálið – fimtan ár – fekk alt ov stóran politiskan týdning«, so má tað eisini merkja, at væl undirbygdar meiningakanningar høvdu gjørt, at áramálið fimtan ár hevði ikki fingið sama politiska týdningin – og at mangt kundi verið øðrvísi í fullveldisgongdini! Spurningurin, Carl Jóhan Jensen nú skyldar okkum at svara, gevur seg sjálvt: Hvussu skuldi henda væl undirbygda meiningakanningin verið gjørd?

Sum vera man so hevur tað alstóran týdning, at vit fáa hesa leiðbeining frá Carl Jóhan Jensen, so Fynd ikki aftur eina aðru ferð í berum ósketni kemur til at skumpa søgunnar hjól skeivan veg.

Innispunnið tógv

Palli Dalsgaard

Endiliga upplivdu vit, at út kom innispunnið tógv. Tað vil siga, dagurin tá fullveldis ætlanin skal byrja, og hvussu hon skal síggja út.

Ikki tí, teir allar flestu veljarar vóru greiðir yvir ætlanina langt frammanundan. Spurningarnir sum journalistarnir settu á tíðindafundinum í Tinganesi vóru ógvuliga skilagóðir og viðkomandi, men aftursvarini vóru tey somu, sum hava verið síðan hasi fólkini komu framat eftir seinasta val. Landsstýrislimirnir blíva við at trútta niður í okkum, at vit skulu samla pengar í ein grunn, at hava at taka til tá ástendur. Tað er eingin kunstur at samla pengar hjá landsins kosnu monnum, tá tað við viðlíkahaldast skal, ikki verður viðlíkahildið.

Yvirtøkurnar verða tileinkisgjørdar í tann mun, at tær kosta næstan einki og harmiligt er, at menn skulu nevna tøl sum ikki eru røtt, tí tey tølini villleiða, í staðin fyri at rættleiða. Jú sanniliga kosta allar yvirtøkur í dýran dóm. Og í heilatikið at reka eitt so lítið oyggjarsamfelag kostar nógv meira enn tey fólk har búgva orka at gjalda, um tað skal eitast eitt vælferðarsamfelag. At føra tað fram, at blokkurin er ein náðigáva úr Danmark er ikki rætt. Pengarnir eru eini rættindi vit eiga sum danskir statsborgarar, tað eru einastu rættindi vit eiga eftir, vit hava mist øll onnur rættindir. At eiga danskan statsborgaraskap er ein so stórur fyrimunur fyri okkum, at hann kann ikki yvirmetast, at fara við fríðum vilja at siga hann frá okkum er ímóti allari nattúru.

At siga at blokkurin villleiðir okkum, so vit ikki fáa húsast á rættan hátt, er so langt við síðuna av, sum tað kann. Um rætt var atborið skuldi hvørt oyra verið brúkt sum loypir av, tí tað er brúk fyri hvørjum oyra. Í staðin fyri at samla pengarnar til fullveldis fantasi.

Føroyska fullveldi ein »fiasko« Suðuroya fullveldi eitt fólkakrav

Flemming Samuelsen
Trongisvágur

Eftir at hava hoyrt um fullveldi nú í nógv ár og tann 31. januar havi lisið Sosialin, kann eg ikki lata vera við at siga frá mínari hugsan, um tað støðu hetta landið nú er í.

Vit hava enn fólk í Suðuroynni, sum minnast tá fólk norðanfjørðs komu suður at arbeiða. Tað er ikki ov nógv sagt, at hesi fólk komu suður av svongd, og illa nokk vistu hvat faðirvár var, tey vóru altíð vælkomin at arbeiða her suðuri, bæði á sjógvi og landi.

Hevði man vita at hesi fólk bert komu suður at mergsúgva Suðuroynna, og fáa sær vitan, hevði blíðskapurin í Suðuroynni neyvan verið so stórur, sum hann var.

Vit hava undir núsitandi landsstýri sæð, at stavnhaldið hevur verið at minka um Føroyar. Fyri ikki so nógvum árum síðani, tá tosað bleiv um útjaðarin, bleiv tosað um Fugloy, Mykines og Suðuroynna. Tá oljutosið av álvara tók seg upp, var staðfest at útjaðarin skuldi takast við. Ífylgi Eyðun Elttør er hetta gjørt, Tórshavn og Runavík er nú blivin útjaðarin í Føroyum.

Halgir W. Poulsen skrivar í Sosialinum 31. jan. 01 »At tað er ongin bøn hjá suðuroyingum, teir sleppa ikki burtur úr Føroyum, um teir so standa á høvdinum«. Her vil eg minna á, at høvdu tit í Havn havt bæði beinini á jørðini, høvdu tit fingið okkara fulla stuðul. Tit sum stýra í Havn hava koyrt Føroya land út har vit í Suðuroy ikki kunnu fylgja við. Tit fáa góðar 900 mill. um árið, so tit í Havn kunnu uttan trupulleikar velja fullveldið, men hava tit hugsað um hvat skulu skulu gera, tá ið hesar 900 mill., sum tit eru so góðir við, blíva tiknar frá tykkum.

Vit her suðuri hava ongar hugsanir um at standa á høvdinum fyri eini fríari Suðuroy, men tað hevði glett okkum, um tit í Havn fingu bæði beinini á jørðina aftur, so vit í felag kunnu byggja hetta landið upp á einum skilagóðum/røttvísum støði.

Tit missa ikki bert blokkin, nei nú skal rentustuðulin takast av, og sostatt allar Føroyar revsast, tí tit í Havn við politikkarunum á odda, hava gingið og spælt stórir í alt ov langa tíð. Nú er man so komin til, at allar Føroyar skulu gjalda fyri tann ørskap, sum gongur fyri seg í Havn. Hvat hava teir høgu húsaprísir í Havn við Suðuroynna og aðrar útoyggjar at gera.

Halgir W. Poulsen skrivar eisini, at vit ikki kunnu fáa loysing frá restini av Føroyum, hetta er milt sagt tvætl, sitandi Landsstýri hevur longu givið okkum ein part av tí fullveldi ein stórur partur av okkum suðuroyingum vilja hava. Vit eru longu valdir frá, so hví ikki taka tað síðsta stigið, vekk frá tí niðurbrótandi kreftunum í Havn, ið billa sær inn, at teir stýra hesum landi.

31. januar '01 skriva 6 lærarir í Tvøroyra skúla um eina fullveldis ætlan fyri Suðuroynna, eg og nógv onnur stuðla hesi hugsan, og vilja minna Halgir W. Poulsen og øðrum, at hetta er ikki skemt. Av skaparans hond er alt ríkidømi undir Føroyum lagt sunnan fyri Suðuroyarfjørð, hettar er av góðari grund, tí vit suðuroyingar eru teir einastu, ið kunnu stýra hesum ríkidømi, so tað kemur til allar endar av landinum, eisini til tey sum búgva í útjaðaranum. Tí vil eg heita á allar suðuroyingar, standi saman, arbeiði fram móti loysing frá restini av Føroyum.

Her veit eg, vit suðuroyingar fáa fullan stuðul frá Sandoynni, ið eisini hevur verið gloymd alt tað eg kann minnast.

Tað verður ikki lætt at loysa Suðuroynna frá restini av Føroyum, um um heldið er við okkum, skal tað nokk eydnast. Hugsa tær til, vit eiga Suðuroyarfjørð, og alt tað, ið liggur sunnanfyri. Tey bestu fiskiplássini eru og vilja altíð vera okkara, oljuna skulu vit nokk finna, hon er jú á okkara øki, so kunnu tit norðanfjørs komið suður at arbeiða sum í gomlum døgum, tá landið stóð saman. Og til tykkum, ið ikki eru sjósterk, skulu nokk fáa eitt pláss í Hvalba ella Rangabotni har kolið liggur og bíðar. Ríkidømi, ja sjálvt merkið er okkara.

Teir sum ikki vilja taka ímóti arbeiði her suðuri, kunnu passa Norðurlandahúsið, Listaskálan, Smiðjuna í Lítluvík og mangt annað, sum ongantíð hevur givið eina krónu í Landskassan, og teir sum eftir eru, kunnu fara til Kirkjubøar at smelta glas saman við teimum tjóðveldismonnum, ið har eru.

Og til tykkum sum skulu umbyggja tinghúsið, tit vera nokk koyrdir til hús, her verður ikki neyðugt við umbygging, sitandi landsstýri hevur víst, at húsið er vælegnað til sjónleikarahús, so tað skal vera sum tað er, so leingi núsitandi landsstýri situr.

VIÐMERKINGAR

Landsstýrisætlanin

Steinbjørn B. Jacobsen

So boðaði landsstýrið frá síni ætlan. Eg giti, at eitt fleirtal av fólkinum stúrdi fyri, at tað flaknaði undir tí mikla fargi, bæði úr Danmark og úr Føroyum.

Sjálvandi eru ikki øll fult nøgd í teimum trimum flokkunum, og eg loyvi mær at nevna Miðflokkin eisini, men soleiðis er demokratiið.

Tað versta, sum kundi hent, var, at landsstýrið legði frá sær.

Hvussu fólk fara at velja, veit eg ikki, men ein meirirluti av fólkinum hevur reist seg fyri at fara til verka, og órógv er komin á nógv onnur, tí tey skilja, at tíðin er farin frá amti og heimastýri. Javnaðarflokkurin og danska stjórnin hava boða frá sínum uppskotum, sum er so nær núverandi støðu, at hesi uppskot gera hvørki frá ella til. Um tú spyr onkran, sum er ímóti landsstýris uppskotinum, hvussu okkara skipan so skal vera, kemur einki ítøkiligt. Álop kanska á landsstýrisfólk og flokkar. Onkur spyr treiskur um eg ikki havi tað gott? Vit kunnu bara hava alt sum tað er. Hvat feilar?

Men tað er júst tað, vit ikki kunnu, um vit vilja tað ella ei. Tíðin stendur ikki í stað.

Heimurin broytist við rúkandi ferð. Okkara viðurskifti við umheimin og Danmark broytist dag frá degi, bara fyri at nevna eitt umráði.

Einaferð vóru tað pengarnir úr Danmark, sum bundu okkum á hond og fót, stóra sleggja í øllum kjakum, men nú eru allir frøðingarnir samdir um, at vit fyri alt í verðini mugu gera okkum leysar av teimum.

Haraftrat hava vit týðuliga og greitt fingið at vita úr Danmark, at blokkstuðulin ráða danir fyri, og kunnu gera við hann, sum teir vilja. Finna vit olju, ella finna danskir frøðingar, at vit eru ríkari enn ein danskur landslutur, minka teir blokkin.

Okkara búskaparfrøðingar vísa nú á, at ein hugburðsbroyting er farin fram serliga í vinnuni, tað framgongd, sum hevur verið, kann ikki skiljast annarleiðis. Fiskaprísirnir og fiskamongdin gevur teimum ikki alt svarið.

Hví skulu vit støðga hesu menning? Tað er fyri mær, sum at nógv fólk eru vaknaði, vilja royna egna megi og mátt. Hesi fólk skilja til fulnar, at einasta sanna og berandi ríkidømi er tað, tey sjálvi skapa.

Hví skulu vit hava demokrati við upp? Tað burturforklárast ikki, at vit bert hava havt eitt beinskert demokrati. Í tíð og úrtíð tosar ein flokkur um demokrati. Komið altíð at hugsa um, »at tjóður heldur, at hvør maður stjelur«. Innast inni mugu teir kenna ta sonnu støðuna á sær.

Einki annað landsstýri hevur fingið so nógv frá hondini og tað á so nógvum økjum sum hetta. Mótstøðan hevur verið stór bæði úr Danmark og Føroyum, men fólkakrav longu um fimm ár, at fáa eitt fullveldisval.

Vil tað so siga, at teir halda at siga vit ja til landsstýrisætlanina nú, vera vit at klára okkum so væl, at eingin tá ivast í at seta krossin fyri fullveldinum. Er tað so livandi galið, at teir rista í brókunum, stúra fyri at vit mennast og fáa víst, at vit klára okkum sjálv. Eingin ræðumynd um neyð og elendig heit. Hvat skulu teir so gera? Ótrúligt, at teir ferð eftir ferð sláa seg sjálvan fast á munnin uttan at látast um vón.

Eitt týðandi val er fyri framman, kalla tað, hvat tú vilt, men vinnur jaið, vilja vit uppliva eitt vár, sum eingir dugir at ímynda sær. Eisini tey hálvivandi verða lættað.

Hetta kann eg prógva við at vísa til, hvat hendi í Noregi í 1905 og í Íslandi í 1944.

Vit sleppa undan hesum æviga kjakinum um Danmark og Føroyar. Hugsi tykkum, um øll henda orkan var brúkt til at byggja eitt gott samfelag við.

Vinnur neiið, mugu vit herða stríðið, meðan hini kunnu seta seg upp aftur á.

»Nei í mai«, er nei til várið. Í stríð við sjálvt lívið.

Ruðuleikin fullkomin

Lisbeth L. Petersen
løgtingslimur

Nú tíðin styttist, og vit nærkast endanum á hesum landsstýrisskeiði, valdar fullkomið kaos!

Tað vóru annars ikki smámál, henda samgonga hevði sett sær fyri at loysa, men ikki kann sigast, at tað hepnaðist serliga væl.

Samráðingarnar við donsku stjórnina, sum skuldu ganga so lætt eftir fullkomnum leisti, tilevnaðum av landsstýrismanninum í sjálvsstýrismálum, gingu alt annað enn eftir ynski, og so góvu tey skarvin yvir og fóru sína egnu leið!

Teir føroysku andstøðuflokkar og politikkarar, sum søgdu sína erligu meining um sokallaðu »tilgongdina«, áðrenn samgongan fór til Danmarkar á fyrsta samráðingarfundin, og sum ikki vóru samd, men hildu samgonguna fara við einum órealistiskum uppskoti, ið var dømt at miseydnast, fingu niðurlátandi smíl og suff frá samgonguni á sokallaðu »kaffifundunum«, uttan iva tí tey vóru hildin at vera býtt

Tí nú vóru tað vit føroyingar, sum settu dagsskránna, og vit vóru væl fyrireikaðir, samb. løgmanni!!

Úrslitið gjørdist eitt heilt annað, sum vit øll vita.

Samgonguskjalið

Í skjalinum, sum henda samgongan skrivaði undir í **mai 1998**, stendur m.a.:

- Farið verður undir samráðingar við donsku stjórnina í **1998** um donsk-føroysk viðurskifti við tí endamáli, at Føroyar verða sjálvstøðugar (suverenar).
- Føroyskur heimarættur verður staðfestur frá **januar 1999**.
- Ein sáttmáli verður gjørdur o.s.fr….
- Tá ið sáttmálin millum Føroyar og Danmark er gjørdur og samtyktur á Føroya løgtingi, verður hann lagdur til fólkaatkvøðu.

Hvat hendi síðan?

Nú skriva vit **2001**, og gongur tað, sum samgongan vil, so skal ein fólkaatkvøða verða í mai í ár og ein onnur í **2012**, men sáttmála hava vit ongan at taka støðu til. Uttan so mikið sum at skammast, vilja tey binda komandi landsstýrir á hond og fót til at føra síni áhugamál (les: tey hjá landsstýrismaðurin við sjálvsstýrismálum) ígjøgnum við yvirtøkum, niðurlaging av blokki o.s.fr.

Sjálvi megnaðu tey lítið annað enn at øsa fólkið upp móti hvørjum øðrum, móti dønum og vice versa, og at hækka blokkin, soleingi tey sita.

Sjónleikur

Vit hava verið áskoðarar til ein sjónleik av tí aðru verð.

Samgonguformenn greiddu føroyingum frá í sjónvarpssending í vikuni, hvat fór at henda viðvíkjandi fólkaatkvøðuni, og hvar vit vóru stødd í løtuni.

Ikki ein teirra segði tað sama.

Hvør hevði sína egnu tulking.

Fólkaflokkurin (Óli Breckmann) segði, at áðrenn eina fólkaatkvøðu mátti tosast við hin partin, og at embætismenn vóru ikki givnir enn við sínum samráðingunum,

Tjóðveldisflokkurin (Heini O. Heinesen) tosaði um samráðingarnar, sum slitnaðu,

Sjálvsstýrisflokkurin (Helena Dam á Neystabø) tosaði um alt møguligt.

Aftaná sjónvarpssendingina er tó fólkafloksformaðurin, Óli Breckmann, nú rokin við buldur og brak niður í lumman hjá Høgna Hoydal, landsstýrismanni, har tað nú mátti verið nakað trongligt, tá løgmaður og formaður Sjálvsstýrisflokksins eru har frammanundan

Jú so vissiliga, nú er ruðuleikin fullkomin, og tað hevur føroyska samfelagið ikki uppiborið.

Málið um Brimil

Eli Brimsvík
formaður, Havnar Handverkarafelag

Hetta eigur at steðgast beinanvegin, og vísir Løgtingið ikki málið um Brimil frá sær, eiga feløgini at seta tiltøk í verk.

Eg haldi, at tað er ein vanærislig skomm, at Karsten Hansen ikki hevur klárað at fingið ein sáttmála í lag enn, og hann eigur at taka avleiðingarnar og leggja frá sær, og um hann ikki vil fara sjálvboðin, so eigur løgmaður at loysa hann úr starvi.

Hvat ósemjan botnar í, í prosentum og tølum, skal eg ikki koma so nógv inn á, men tá hugsað verður um, at sami Karsten Hansen saman við øðrum (tjóðveldismonnum), ikki brúkti meir enn fáar tímar at hækka sínar egnu lønir umleið 60% og samstundis ikki unnir øðrum eina líknandi løn fyri teirra arbeiði, oftani undir sera hættisligum umstøðum, so líkist hetta »diktaturi«, eingin ivi um tað.

Hetta eru somu menn, sum vilja loysing og sum biðja vanliga fólki um at hava álit á teimum. Tað er ringt at gita, hvat fakfeløgini kunnu rokna við, um hesir persónar koma at mynda leiðsluna í einum komandi fullveldi.

At grundin hjá Karsten Hansen fyri at fara í tingið við málinum millum annað er várróðurin á Norðurhavinum, er bara rein undanførsla, tí um nakar vilji var tilstaðar, so kundi hann bara syrgt fyri at givið manningini ta løn, sum teir krevja (eiga at fáa).

Hví skulu okkara yvirmenn sigla fyrl hálva hýru samanborið við eitt nú norðmenn, sum sigla við norsku vaktartænastuni, sum tit altíð samanbera við.

Eg vóni, at fakfeløgini gera álvara av at seta tiltøk í verk, um tingið ikki vísir málinum frá sær.

Konsertfelagið

Tíðindaskriv

Sámal Petersen, fiól og Ólavur Jacobsen, gittara fara komandi fríggjadag og leygardag at hava konsertir í ávikavist Leirvík fríggjakvøldið 9. februar kl. 19.00 og í Listaskálanum leygardagin 10. februar kl. 16.00.

Tónleikurin á konsertini verður einamest virtuosur fiól-og guittartónleikur eftir so kend tónaskøld sum Niccolo Paganini, Fritz Kreisler, Jacques Ibert og Enrique Granados.

Harafturat verða báðir teir føroysku snillingarnir at hoyra í einleiki á ávikavist fiól og gittara. Teir fara hvør sær at framføra brot úr partitum eftir mæta tónaskaldið Johann Sebastian Bach.

Á konsertini verður eisini eitt lítið verk eftir Beethoven, ið sum kunnugt ikki skrivaði fyri fiól og gittara. Talan er um eitt lítið spælt verk fyri mandolin og kembal, ið Beethoven skrivaði til ein av vinmonnum sínum, ið eisini umframt at leika fiól, leikti mandolin. Hetta verið varð so seinni umskrivað fyri fiól og gittara og er tað í hesum líki, at vit fara at hoyra tað.

Teir báðir, Sámal og Ólavur, hava sett skránna soleiðis saman, at hon verður fjølbroytt og løtt at lýða á. Har verður eitt sindur av hvørjum: Íblástur av sponskum fólkatónleiki í Granados og fronsk elegansa í Ibert, og eisini serstaki wienarastílurin í verkunum hjá úrmælinginum Kreisler. Meistararnir báðir, Bach og Beethoven, verða eisini at hoyra og so endar konsertin við italskum fýrverki eftir Paganini.

Fyrra konsertin verður í Gamla Turkihúsinum hjá Osmundi Justinussen í Leirvík fríggjakvøldið kl. 19.00 og seinna konsertin verður í Mykinestorninum í Listaskálanum leygardagin kl. 16.00.

Atgongumerki á kr. 60,- fáast við dyrnar undan konsertini. Pensiónistar og børn tó kr. 30,-